# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*20. sept. fingu Rógvi R. og Guo Qin Djurhuus, Ulsan Korea, ein son, hann vigaði 4800 gr og var 53 cm langur, hann hevur fingið navnið Filip*



*7. september fekk John eina lítlasystir. Hon vigaði 3500 gr. og var 52 cm. long. Foreldrini eru Eyð og Torfinn Viðoy, Klaksvík*



*18. september fingu Rósa og Fróði Waag, Keypmannahavn eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3354 gram*



*Hin 17 septembur fingu Levi Mørk og Unn Matras Tórshavn ein son, hann vigaði 3500gr. og var 54 cm langur*

10. september fingu Jónvá Joensen, Runavík og Jan Thomsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

11. september fingu Annika Udbø Petersen og Bárður Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3150 gr.

13. september fingu Turid D. Poulsen og Svanur Sveinsson, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4300 gr.

13. sept. fingu Petrina Berg og Carl Á Lag, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3320 gr.

14. sept. fingu Gunnvá Samuelsen og Jógvan Clementsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

15. september fingu Jákubina Thomassen og Brian Johannesen, Toftir, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3800 gr.

16. september fingu Rúna F. Guttesen og Eyðun Eliasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3850 gr.

17. september fingu Unn Matras og Levi Mørk, Tórshavn, ein son, hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

18. september fingu Petra W. Mikkelsen og Per Mikkelsen, Strendur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

18. september fingu Maibritt og Ragnar í Haraldstovu, Tórshavn, ein son. Hann var 60 cm. langur og vigaði 4650 gr.

19. september fingu Poula A. og Kári Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4610 gr.

20. september fingu Duruta á Lofti og Regin Áki Hansen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

# Sanna og Daniel Pauli Dalbø gullbrúdleyp



Leygardagin 22. september kunnu foreldur okkara Sanna og Daniel Pauli halda gullbrúdleyp.

Pápi hevur altíð verið álitismaður sum fáur. Longu sum 14 ára gamal bleiv hann "maður í húsinum" tá hann sum einsamallur beiggi saman við 6 systrum misti pápan.

Evnini og heilsan hava altíð verið góð, so hann hevur ikki tikið skaða av at arbeiða nógv og hart.

Eftir barnaskúlan fór hann í læru sum timburmaður, og eftir at hava smíða í nøkur ár, fór hann fyrst í 60'unum at starvast á Tøtingarvirkinum, har hann var í 23 ár, tey flestu sum formaður.

Sjónátturan hevur altíð verið ring, men hevur hann tó roynt sjólívið í styttri tíðarskeið. Á yngri árum var hann við Kongshavn og í 80'unum var hann nakrar túrar við Jupiter. Eftir hetta hevði hann fast starv hjá Landsverk, sum arbeiðsformaður, inntil hann fall fyri aldursmarkinum hjá tí almenna.Síðan tá arbeiddi hann á Aluplast,og hesi seinastu 2 árini hevur hann smíða saman hjá tí elsta versoninum.

Á øðrum økjum hevur pápi eisini verið virkin, og er tað enn. T.d. hevur hann verið deknur við Gøtu kirkju líka síðan 1972. Hann hevur sitið í kirkjuráðnum, stýrinum fyri missiónshúsið, skúlanevndini, verið formaður í Samhald og øðrum álitissessum við.

Í frítíðini dámar pápa væl at verða úti í náttúruni. Sum yngri var hann røktingarmaður, og hann hevur altíð havt stóran alsk til djór – sjálvur hevur hann bæði seyð og gæs, sum hann gongur upp í við lív og sál.

Danir plaga at siga nøkulunda soleiðis: "Bag enhver mand, er der en kvinde", og soleiðis er eisini í hesum førinum. Mamma er fødd og uppvaksin í Króki á Toftum, saman við sínum 5 systkjum. Sum gentur flest tá á døgum, fór mamma sum blaðung genta út at tæna, og seinni á húsarhaldsskúla í Danmark. Evnini í einum køki eru ógvuliga góð. Ikki eru tað so fáar køkur og annað gott sum eru farin í okkara búkar.

Serliga stuttligt og hugnaligt var at verða í bønum um sumrarnar. Tá gjørdi mamma drekkamunn á primus, og so hevði hon altíð nýbakaða kaku, vaflur og nýgjørt súltutoy við til okkum.

Til hendurnar er mamma eisini ófør, og mong eru pløggini hon hevur bundið og seyma, bæði til okkum, ommubørnini og onnur við.

Mamma hevur næstan øll árini verið heimaarbeiðandi, og hevur verið pápa og okkum børnum ein hollur stuðul. Sum børn minnast vit hvussu deiligt tað var, at mamma var heima tá vit komu úr skúla. So skjótt sum hurðin var latin upp, bleiv spurt eftir mammu, og man føldi luktin av nýbakaðum køkum ella bollum, men um mamma ikki var inni, so var tað sum um eingin var heima.

Í dag eiga mamma og pápi 21 ommu- og abbabørn, sum tey ganga uppí við lív og sál. Vit systkin við familju vilja við hesum fáu orðum ynskja tykkum hjartaliga tillukku við hesum stóra degi, við ynskum um eina ríka og av Gudi signaða framtíð. Eisini takka vit tykkum fyri alt tað tit hava verið og framvegis eru fyri okkum.

Vælkomst verður í kirkjukjallaranum frá kl. 11 til kl. 15 leygardagin tann 22. september.

## Dagurin

**22. september. Mauritius**, deyður umleið ár 300. Rómverskur herhøvdingi, sum saman við 6666 hermonnum í liði sínum (tebanska legiónini), ið allir vóru kristnir, varð tikin av døgum. Navnið merkir *blámaður.*

**23. september. Linus,** deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir ikki við vissu.

**24. september. Tekla**, deyð umleið ár 100. Hon hevði hoyrt apostulin Paulus prædika og varð umvend. Hóast hon varð illa forfylgd, slapp hon undan hvørja ferð og doyði friðarliga 90 ára gomul.